**Føroya Handverkarafelag dagførir sína tryggingaravtalu.**

Hósdagin 13. desember 2018 undirskrivaðu Føroya Handverkarafelag og LÍV eina dagførda avtalu fyri limirnar hjá Føroya Handverkarafelag. Avtalan er galdandi frá 1. Januar 2019 at roknað.

Í hesum umfarinum er tað lívstryggingin, sum er hækkað upp í kr. 600.000,- og útgjaldið til børn undir 18 ár, ið er hækkað úr kr. 30.000,- til kr. 40.000,-

**Nýggju upphæddirnar fyri samlagstryggingina eru hesar**:

| | |
|---|---|
| • Lívstrygging | kr. 600.000,- |
| • Lívstrygging - hjúnafelagi/sambúgvi | kr. 300.000,- |
| • Útgjald til børn undir 18 ár | kr. 40.000,- |
| • Ávísar hættisligar sjúkur (limur) | kr. 125.000,- |
| • Ávísar hættisligar sjúkur (børn undir 18 ár) | kr. 125.000,- |
| • Upphædd í einum við fylta 67 ár | kr. 100.000,- |

**Fyri lærlingar er samansetingin sum víst niðanfyri:**

| | |
|---|---|
| • Lívstrygging | kr. 600.000,- |
| • Ávísar hættisligar sjúkur (limur) | kr. 125.000,- |
| • Ávísar hættisligar sjúkur (børn undir 18 ár) | kr. 125.000,- |

Avtalan er dagførd innanfyri verandi karmar í sambandi við gjald til tryggingar og ávirkar hetta tí ikki inngjaldið til pensjónspartin.

Føroya Handverkarafelag leggur stóran dent á, at limirnir eru væl tryggjaðir, og eftirmetir javnan samanseting og tær upphæddir, sum knýta seg til felagstryggingina.




Suni Simonsen, formaður í FHF og Dan Joensen umboð fyri LÍV.